## Pirlo var besti maður

Ein fylgibólkur hjá UEFA valdi italska miðvallarspælaran Andrea Pirlo til besta spælaran í HM-finaluni í gjárkvøldið. Pirlo hevði ein týðandi leiklut á italska miðvøllinum, og hann var eisini ein av spælarunum, ið skoraði upp á brotsspark í endabrakinum frá 11 metrum. Pirlo hevur spælt sera væl fyri Italia undir HM-kappingina, og í sínari støðu aftarliga á miðvøllinum hevur hann havt spælstýrandi leiklutin, sum Totti ongantíð fekk longur frammi á vøllinum.

## Todi ímóti oddaliðnum



Lutakast hevur verið um, hvussu spælast skal í næsta umfari av norsku steypakappingini í fótbólti. Todi Jónsson og liðfelagarnir í Start vunnu seg í farnu viku víðari eftir brotssparkskapping ímótu Haugesund, og Todi skeyt avgerandi sparkið. Í næsta umfari fær Start ein sera truplan dyst, tí teir skulu spæla ímóti Brann, dysturin verður eftir øllum at døma spældur á heimavøllinum hjá Start. Brann liggur í løtuni á odda í norsku tippuliguni, meðan Start stríðist í skeiva endanum.

# Besta løtan í lívinum

**– Hetta er tað største, sum ein fótbóltsspælari ella venjari kann uppliva, segði italski landsliðsvenjarin, Marcello Lippi, eftir sigurin í HM- finaluni sunnukvøldið**

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eftir 911 dystir í undankappingum og endaspæli stóð eitt land sunnukvøldið eftir sum heimsmeistari í fótbólti 2006 – Italia.

Finalan ímóti Fraklandi var væl spæld og dramatisk. Bæði liðini søktu at fyri at skora frá byrjan, og longu tá 17 minuttir vóru spældir, høvdu liðini skorað eitt mál í part.

Málsøkna spælið helt fram, til kreftirnar gingu undan í seinna hálvleiki, og í umdystinum var lítið veiggj í spælarunum. Strævna HM-skráin og krevjandi finalan gjørdu, at spælararnir vóru útlúgvaðir, og tað var einki annað at gera, enn at avgera dystin við brotsspørkum.

Italia, sum ongantíð áður hevur vunnið brotssparksskapping í HM, gjørdi bart, og allir teir fimm skjúttarnir skoraðu. Ein fraklendingur misnýtti, og tað var innskifti David Trezeguet.

### Lippi á toppinum

Italski venjarin Marcello Lippi var ovurfegin eftir HM-sigurin, og hann hevði allatíðina lagt dent á, at tað var ikki nóg mikið at koma í finaluna. Hansara lið skuldi eisini vinna.

– Hetta er tað største, sum ein fótbóltsspælari ella venjari kann uppliva. Hetta er besta løtan í mínum lívi, segði Lippi og ognaði HM-sigurin til sína familju.

– Eg má siga takk til mínar spælarar. Teir hava víst hjarta, persónligheit og karakter, segði hann.

### Zidane segði farvæl

Franski stórspælarin Zinedine Zidane spældi sín seinasta fótbóltsdyst á høgum stigi nakrantíð sunnukvøldið. Hann spældi væl á miðvøllinum og skoraði franska málið. Harafturat var hann líka við at skora til 2-1 í umdystinum við einum sera góðum stútara.

Og so endaði alt við, at Zidane misti høvdið og skallaði Matarazzi í bringuna. Tað endaði við, at Zidane fekk reyða kortið og noyddist av vøllinum 10 minuttir fyri tíð.

Hóast hendan keðiliga enda, so kann hendingin ikki skugga út yvir, at Zidane man hava verið besti fótbóltsspælari í heiminum seinastu 20 árini, og hann telist millum teir størstu í fótbóltssøguni yvirhøvur.



*Thierry Henry má standa og hyggja at, meðan Fabio Cannavaro tekur ímóti HM-steypinum á Olympiska leikvøllinum í Berlin í gjárkvøldið*
*Mynd: Scanpix*



*Zidane sigur farvæl við einum óskiljandi stútara í HM-finaluni, men hendingin kann ikki skugga út yvir, at Zidane man hava verið besti fótbóltsspælari í heiminum seinastu 20 árini*
*Mynd: Scanpix*